gult6 cyan6 magenta6 svart6

Livialdurin er longdur

Ein nýføddur drongur í Føroyum kann væntast at liva 75,2 ár, men ein nýfødd genta kann væntast at liva 81,4 ár

LIVIALDUR
Stefan í Skorini

Væntaða miðallívsævi ella miðallivialdurin gerst alsamt hægri í Føroyum. Bæði hjá monnum og kvinnum er livialdurin 2 ár longri enn fyri 20 árum síðani. Hetta stendur at lesa í Hagtíðindum.

Fyri tjúgu árum síðani var miðallivialdurin hjá mannfólki 73,3 ár, og hjá kvinnum var hann 79,6 ár. Síðani er livialdurin spakuliga hækkaður. Ein nýfødd genta fer væntandi at liva í 81,4 ár, og livialdurin hjá einum nýføddum dreingi er 75,2.

Enn kunnu vit staðfesta, at kvinnur framvegis liva í miðal 6 ár longur enn menn.

Peningur til lívbjargarar

JÁTTAN
Stefan í Skorini

Fíggjarnevndin í Tórshavnar býráð samtykti á fundi týsdagin at játta 120.000 krónur afturat um árið til svimjihøllina í Havn. Hetta var eftir tilmæli frá mentanarnevndini.

Peningurin skal nýtast til at hava ein lívbjargara í høllini, meðan barnagarðarnir vitja høllina um morgunin, meðan svimjihøllin er stongd fyri almenninginum.

Svimjihøllin fær 60.000 krónur í ár, so lívbjargarin kann byrja eftir summarfrítíðina, men framyvir fær svimjihøllin 120.000 krónur meira um árið, so møguleiki verður at hava lívbjargara í stóllinum í høllini allan dagin, meðan fólk eru í hylinum. Harvið verður trygdin betrað.

Stovna felag fyri minnisveik

Mánakvøldið verður fyrireikandi fundur til stovnan av felagi fyri dement ella minnisveik. Fundurin verður tann 25. juni kl. 19.30 í MBF húsinum á Íslandsvegi 10.

Skráin er gjørd. Fyrst bjóðar Sigrún Mohr vælkomin, og síðani heldur Vilgerð Astridardóttir stuttan fyrilestur um demens. Videofilmur um Alzheimer demens við heitinum »Når personligheden krakelerer«.

At enda verður orðaskifti um stovnan av felagi.

Føroyingar lata handil upp í Lettlandi



Jákup á Dul Jacobsen hevur saman við Pola Purkhús og Nils Stórá latið ein handil upp í Riga í Lettlandi

Føroyingurin Jákup á Dul Jacobsen hevur saman við Pola Purkhús og Nils Stórá latið ein handil upp í høvuðsstaðnum í Lettlandi, Riga. Teir reka nú handlar í Kanada, Íslandi, Føroyum og Lettlandi

HANDILSSKAPUR
Stefan í Skorini

Fyri tveimum vikum síðani lat ein nýggjur handilsdepil upp í lettiska høvuðsstaðnum Riga. Millum handlarnar í nýggja deplinum er handilin hjá havnarmanninum Jákupi á Dul á Jacobsen og Pola Purkhús. Hetta er ein handil líkur Skemmuni í Havn.

Jákup sigur, at hetta er ein roynd, og um tað gongur væl, fara teir at gera meira um seg í baltiska landinum, sum fyrr hoyrdi til Sovjetsamveldið.

– Tað hevur gingið avbera væl higartil við handlinum í Riga. Vit eru bilsnir av undirtøkuni millum fólkið, sigur Jákup úr Íslandi. Hann hevur tveir aðrar føroyingar afturat sær í átakinum. Teir eru Poli Purkhús og Niels Stórá.

Handilin hjá teimum í Riga er 1500 fermetrar til víddar, og har arbeiða eini 30 fólk. Ein íslendingur fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, men Poli og Nils fara javnan at arbeiða í Riga. Handilsdepilin fer at vera einar 35.000 fermetrar, tá hann er liðugur. Tað eru norðmenn, sum hava tikið stig til handilsdepilin.

Fyri at lata handilin upp, krevst ein íløga uppá seks milliónir krónur.

Vaksandi marknaður

Eftir at Lettland loysti frá gamla Sovjetsamveldinum, eru stórar broytingar farnar fram í landinum. Stjórnin arbeiðir við at fáa limaskap í Evropasamveldinum, so landið fríggjar heldur til vesturevropa enn til gomlu yvirvøldina.

Jákup greiðir frá, at marknaðurin og keypiorkan í Lettlandi eru støðugt vaksandi, og tí síggja teir menningarmøguleikar í landinum.

– Vit hava ikki gjørt nakrar serligar kanningar av marknaðinum frammanundan, men íslendingar samstarva nógv við Lettland. Teir eiga m.a. verksmiðjur og skógir, har teir útvinna timbur. Tað kemst millum annað av, at Ísland var tað fyrsta landið at góðtaka teirra sjálvstýri.

Handlar í Kanada

Umframt at hava fimm handlar í Íslandi hevur Jákup eisini sjey handlar á vestursíðuni í Kanada. Tað gongur skjótt við at víðka um virksemið. Til heystar er ætlanin at hava fimm nýggjar handlar í økinum við Vancouver, so talið av handlum verður økt til tólv.

Jákup sigur, at arbeiðsmegin í Lettlandi er avbera góð, og viðskiftafólkið er ikki so krevjandi, sum hjá okkum. Tey eru nevniliga ikki von við eitt høgt tænastustøði.

Í Lettlandi búgva 2,5 milliónir fólk, og í høvuðsstaðnum býr umleið ein millión. 40% av fólkinum eru russar, sum eru fluttir til landið, meðan Sovjet hevði valdið.

Jákup sigur, at enn hava teir ikki ætlanir um at lata handlar upp í øðrum londum.

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Skeivt at brúka fíggjarnevndarskjøl

Fíggjarnevndarskjøl eiga bara heilt undantaksvís at verða brúkt til útgjaldan av peningi, sigur fíggjarnevndarformaðurin. Og ein trongstøða, sum longu er ávíst í februar, kann ongantíð gerast bráðfengis í juni, heldur Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur

PENINGATROT
Edvard Joensen

Upprudding eftir omanlop er ólika meira bráðfeingis enn fíggjarligt upptak, sum skapt er av ólíkindum, og sum vitað er um í fleiri mánaðar, heldur fíggjarnevndarlimurin Vilhelm Johannesen
Mynd: Edvard Joensen

Formaðurin í fíggjarnevndini, Finnbogi Arge, er samdur við Vilhelmi Johannesen, fíggjarnevndarlimi, í, at tað var ikki heilt í tráð við stýrisskipanarlógina at játta Føroya Læraraskúla eina hálva millión krónur.

Í grein 44 í stýrisskipanarlógini stendur, at:

» Eykajáttan verður veitt við løgtingslóg.«

Sum stykki tvey stendur so um undantøk, at:

»Um mál hevur skund, kann løgtingsins fíggjarnevnd veita eykajáttan, uttan so er, at tveir fimtingar av nevndarlimunum krevja málið avgjørt við løgtingslóg.«

Finnbogi Arge, formaður í fíggjarnevndini, sigur, at hann er samdur við tí, Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur, hevur fórt fram um, at tað kann fara at skapa fordømi at brúka fíggjarnevndarskjøl í ov stóran mun.

Men í hesum førinum metti hann, at rætt var at gera tað kortini, tí landsstýrið hevði biðið um tað.

Hann sigur eisini, at tað var óvanliga drúgvt orðaskifti í fíggjarnevndini um hetta málið. Hinvegin sigur hann seg ongantíð hava havt ta fatan, at Sambandsflokkurin skifti meining í viðgerðini, sum eisini hevur verið fórt fram.

Um so var, at teir báðir sambandslimirnir í fíggjarnevndini atkvøddu saman við Vilhelmi Johannesen, sum vildi hava málið viðgjørt í løgtinginum, høvdu teir kravdu tveir fimtingarnir verið fyri tí, og so varð málið beint í løgtingið.

Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur, metti ikki, at málið um Læraraskúlan er nakað bráðfengismál, tí tað var longu í februar ávíst, at pengar fóru at mangla hjá skúlanum.

Grundin til støðuna í dag, sigur hann, er tann, at málið er ov illa hagreitt av teimum landsstýrismonnum sum hava havt við tað at gjørt.

Hann vísir á, at tað í hesum valskeiðnum bara hava verið fimm mál, sum avgreidd hava verið við fíggjarnevndarskjali. Og tey hava av sonnum kunnað verið nevnd bráðfengis.

Tey fimm málini vóru:

Neyðhjálp til Kosovo.

Upprudding eftir glopraregn og omanlop í september mánaða í fjør, tá fleiri vegir og hús fingu stóran skaða.

Tvær ferðir eykajáttan til at leiga skip fyri Dúgvuna. Fyrru ferð, tá Dúgvan tók botn í Leirvík, og seinnu ferð, tá stemplið fór út gjøgnum blokkin.

Tað fimta málið var ein lyfta til Føroya Studentaskúla, sum biðið varð um til ein næming, sum sat í rullustóli. Tann umsóknin kom so mikið seint, at mett varð neyðugt at avgreiða málið við fíggjarnevndarskjali, so næmingurin kundi byrja skúlagongd til tíðina.

– Tað dugir einhvør at síggja, sigur Vilhelm Johannesen, fíggjarnevndarlimur, at munur er á upprudding eftir omanlopi ella havarií hjá Strandferðsluni og peningatroti til ein skúla, sum vit vistu av longu í februar, men ikki er avgreidd fyrr enn nú av berum ólíkindum.

Nógv virksemi í Kollafirði

Tað grør um gangandi fót á havnarlagnum í Kollafirði. Tá nýggja frystivirkið er reist og bygt saman við frystihotellinum, vera 10.000 fermetrar samanhangandi undir taki

VIRKISBYGGING
Edvard Joensen

Tann lítli má lúta fyri tí stóra. Gamli Salmex bygningurin verður tikin niður, og eitt risastórt frystivirki verður bygt á økinum
Mynd: Edvard Joensen

Kollafirði: Tað verður arbeitt dúgliga á havnarlagnum í Kollafirði. Arbeiðið upp á nýggja frystivirkið til uppisjóvarfisk er farið í gongd, samstundis sum fylt verður út yviri á Oyrareingjum.

Jákup Suni Joensen, formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar Kommunu, sigur, at ætlandi skal tann stóra útbyggingin á Langasandi vera liðug um árskiftið. Tá eru verandi frystihotell og komandi frystivirki samanbygd í ein bygning, sum verður einar 300 metrar til longdar og 10.000 fermetrar til víddar.

Gamli Salmex bygningurin, sum hevur staðið á økinum, verður nú tikin niður, og rundan um hann fer so fundamentið til nýggja frystivirkið at standa. Farið er longu undir stoypingina av fundementinum.

Jákup Suni Joensen greiðir frá, at talan er um ein 5.300 fermetra stóran bygning, sum við eini gjøgnumkoyring verður bygdur fastur í tað verandi frystihotellið, sum er 4.700 fermetrar til víddar. Tann sonevnda gjøgnumkoyringin skal hýsa flutningsbondum, har frysta vøran frá virkinum verður flutt eftir á goymslu á frystihotellinum.

Framman fyri hesum báðu bygningunum verður gjørdur bryggjukantur upp á tvær ferðir 100 metrar, sigur Jákup Suni Joensen. 100 metrar til hvønn bygningin, og so er eitt øki ímillum, sum eisini er 100 metrar. Men orsakað av avmarkingum í íløgukvotuni hjá kommununi, fer tað pettið at bíða fyri fyrst, sigur hann.

Íløgukarmurin er 19 milliónir, og hvør av hesum bryggjukantunum kostar, tá hann er liðugur við upplandi og asfalti, einar 14 milliónir, sum verður fíggjað yvir tvey ár.

Tá báðir kantarnir eru gjørdir, fer at bera til at hava eini trý skip liggjandi í senn. Til dømis tvey nótaskip, sum landa, har bæði stinga út um kantin hvør sínu megin, samstundis sum avskipað verður umborð á eitt farmaskip, sum eisini kann stinga út um endanarnar báðu megin framman fyri hotellinum.

Tað eru byggifeløgini Byggitek og NCC, sum gera arbeiðið á havnarlagnum. Bæði bryggjuna, fundamentið til frystivirkið og niðurtøkuna av Salmex.

Og eisini á Oyrareingjum er arbeiði í gongd, sigur Jákup Suni Joensen. Har verður fylt út og gjørt klárt til eitt rættiliga stórt øki. Einar 100.000 fermetrar, sum ætlanin er at hava liðugt til næstu útbjóðingina í samband við oljuútgerðarhavn, sigur havnarnevndarformaðurin í Tórshavnar Kommunu.

Grótið, sum brúkt verður til ífyllu á havnarlagnum í Kollafirði, hevur Tórshavnar Kommuna keypt frá P/F Vágatunnlinum.